# Blaðið hjá ÁFH

Áhugafelag fyri føroyskar harmonikaspælarar

Íslandsreisa

Nr. 2 desember 2000 2. árgangur

## Bjølgurin

Hópur 33 Færeyinga frá „Áhugafelag fyri føroyskar harmonika-spælarar" kom til Íslands fimmtudaginn 13. júlí með Norrænu. Í hópnum eru 15 hljóðfæraleikarar ásamt fylgdarliði. Hljómsveitin lék á Hótel Íslandi laug-































Bjølgurin. Nr. 2 / desember 2000. Útivið av: Áhugafelag fyri Føroyskar Harmonikuspælarar - postsmoga 3001 110 Tórshavn. Ábyrgdarblaðstjóri: Ísak N. Jacobsen. Tekstir: Prenta á egnum forlagi. Layout: Ísak & Fimmboði

# Leiðarin



So eydnaðis tað kortini at fáa blaðið út aftur. Fyribils mugu vit siga, at blaðið kemur út eina ferð um árið. Tilfari frá limunum hevur ikki verði tað stóra, tó so okkurt er innkomið.

Tað er komið rættuligt lív í felagið í samband við Íslandsúrin. Limirnir hava luttiki og staði fyri einum heilun hópi av ymiskum tiltøkum, sum øll hepnaðus sera væl. Tó var úrslitið av samstarvinum við Báteigarafelagið í Havn eitt satt vónbrot. Meirlutin av tá sitandi nevnd í Bátaeigarafelagnum leyp frá avtaluni ið gjørd var undan tiltakinum. Hvat hetta endar við, veit eg ikki í skrivandi løtu, men hetta er sera skuffandi. Tiltakið kundi veri byrjanin til gott samstarv um eitt afturvendandi tiltak, men nú vandi fyri, at tað fer fyri bakka. Yvasamt er, um tað vendist aftur. Í øllum førum mugu vit ásanna, at meirilutin í tá sitandi nevnd í Bátaeigarafelagnum í Havn ikki var at líta á, tá tað snýr seg um slíkar avtalur. Ein avleiðing av teirra framferð varð, at Íslandstúrurin mundi veri avlýstur, men tað eydnaðist kortini at bjarga túrinum í evstu løtu.

Nú til okkurt meira uppbyggjandi og hugaligt.

Íslandstúruin gjørdist ein sannur dreymatúrur. Alt eydnaðist av tí besta og ongantíð havi eg veri betri móttikin nakrastaðni. Blíðskapurin var so einastandandi, at eg havi ikki orð fyri tí. Vinarbond vóru knítt og fara vit at gerða okkara til, at hesi verða hildin og styrkt. Ísland er okkara brøðratjóð, tað hava vit sanniliga fingið prógv fyri.

Egill Jónsson og konan vóru og vitjaðu okkum í august og segði hann mær, at næsta heyst kemur hann við einum ferðalagið úr Neskaupstaði at vitja okkum, so tá fáa vit møguleika at vísa gestablídni og takka fyri seinast.

Ísak.

# Hjalti skrivar

Grannastevnann

27. maj 2000 fór eitt nýtt tónleikatiltak av bakkastokki í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

Tiltakið hevði heitið "Grannastevna", men var í veruleikanum ein harmonikustevna, sum navnframi Pauli Jacobsen úr Havn skipaði fyri.

Soleiðis sum harmonikustevnan var skipað, so var lagt upp til ein ørvísi stíl enn vanligt hevur verði, tá útgangsstøðið var ta sama, - nevniliga, at savna so nógvar føroyskar harmonikuleikarar sum gjørligt, til stevn.

Sum nakað nýtt, byrjaði dagurin kl. 16:00 við einum barnatiltaki, har bæði sangur, dansur og harmonikutónleikur var á skránni - ein sera hunalig løta.

Seinni partur av Granastevnuni byrjaði umleið kl. 21:30. Luttakandi bólkarnir vóru átta í tali. Í hesum partinum var eisini okkurt nýtt og ørvísi á skránni. Tórshavnar mannskór, sum júst tá var fyrireikað at fara til Eysturríkis á kórolympiadu, luttók við sangi, saman við tveimum harmonikuspælarum. Hesin parturin av stevnuni eydnaðist sera væl, og kann leggjast afturat, at mannskórið stóð seg rættuliga væl á kórolympiaduni í kapping við nógv onnur evropeisk kór.

Eitt annað tiltak á Grannastevnuni var ein dansiframsýsing, har limirnir úr Dansifrøi, í umleið 15 min. sýndu fram nakrar dansir til tónleik, sum bólkurin Blakk framførdi.

Ein partur, sum í stevnuhøpi hevur vundið nógv uppá seg, seinnu árini, eitur "felagssangur", og var hettar eisini ein partur av Grannastevnuni.

Restin av kvøldinum (náttini) til kl. 03:30 spældu teir luttakandi harmonikubólkarnir uppá skift, og endaði stevnan við felagsspæli, har allir spælimenn vóru á palli og "jammaðu" tríggjar gamlar "slagarar".

Alt í alt ein væleydna Grannastevna.



Ætlanin er, at hettar tiltak skal endurtakast, og er tað mín vón at so verður.

Sum eg havi skilt, er ætlanin at fáa útlendskar harmonikuspælarr at koma hendan vegin, næstu ferð Grannastevnan verður.

Í navninum "Grannastevna" liggur eisini ein boðskapur, sum merkir at fáa vitjan úr grannalondunum, og er tað júst tað, sum kundi verið áhugavert, næstu ferð Grannastevna verður - at fingið vitjan av góðum harmonikuspælarum úr okkara grannalondum.

Hjalti

# Vit líta aftur um bak


Venjing undir leiðslu av Óla Johannesen

Ætlanin var, at aðalfundurin skuldi verða í 25. mars 2000 í Sørvági. Av ymsum grundum var aðalfundurin útsettur, men fyrireikingarnar í Sørvági vóru komnar so mikið langt, at avgjørt var at møtast har vesturi kortini.

Nevndin hevur sett sær sum mál at ferðast runt alt landið við aðalfundinum. Nú var túrurin so komin til Sørvágs, men ístaðin fyri aðalfund, so bleiv tað til eitt sokalla "treff". Nevndin boðaði øllum limunum frá, at "treffið" skuldi verða í Sørvági vikuskifti 24. - 26. mars 2000.

Tað var SÍ, sum stóð fyri tiltakinum og vit vóru innkvarteraði í skúlanum. Bjarni Góðadal stóð fyri okkum, tá ið vit komu, og borðreitt var við køkum og smurdum breyði. Felagið eigur bert ein lim í vágunum. Tað er Tummas Heri Thomassen. Hann kom sjálvandi at heilsa uppá okkum. Eisini kom Kári Mikkelsen og sonurin at vitja okkum. Væl dugdu teir at spæla, tað er heilt vist. Tað bleiv spælt og práta langt út á náttina.

Morgunin eftir stóð svimjihylurin í skúlanum til okkara frítt at brúka og fleiri tóku av. So var morgunmatur. Um døguratíð vóru tey flestu, ið ikki vóru komin kvøldi fyri, komin og so var farið ein túr í bygdini. Harmonikan var sjálvandi við og stukku vit inn á gólvið í Løðuhandlinum og hjá Valdmar og spældu nøkur løg. Fagnaðurin var óførður. Onkur sørvágskona, sum óávarða var komin til handils, fekk ein óvæntaðan, men kanska kærkomnan svingom mitt á handilsgólvinum. Tað var sjálvandi okkara góði Fimmboði, ið stóð fyri tí innslagnum. So var farið til Miðvágs og har endurtóku vit tiltakið í Keypsamtøkuni, áðrenn farið varð á Ellisheimið, at undirhalda fyri teimum eldru. Teimum dámdu eisini væl og sungu tey við tá ið tey kendu løgini. Okkum var boði kaffi og køkur árðenn leiðin aftur gekk til Sørvágs.

Um kvøldið skipaði SÍ fyri borðhaldið í skúlanum. Har vóru umboð fyri SÍ við maka, og vit frá ÁFH, so tað mundu verða eini 25 - 30 fólkí talið. Erik Davidsen, umboðandi SÍ segði nøkur mergaði orð og Fimmboði takkaði vegnað ÁFH. Eitt óføra gott borðhald við sangi og prátið og sera góðum mati.

Um 22 tíðina varð farið oman í dansistovuna og so byrjaði dansurin. Vit skiftust um at spæla og tað var fult av fólkið í dansinum. Tvær so fittar av Oyrabakka vóru eisini komnar vestur í dans. Tað varð dansa og sungið langt út á náttina, so svøvnur bleiv lítil og eingin. Um døguratíð sunnudagin vóru tey flestu ferðaklár og fóru hvør til sítt.

Sum eg skilti á lagnum, so vóru sørvingar glaðir og væl nøgdir við tiltakið. SÍ var komið eitt fet nærri tí nýggja húsinum við fótboltsvøllin, ið ætlanin er at byggja. Vit í ÁFH vóru í øllum førum væl nøgd og takka teimum vit møttu fyri blíðskapin. Eitt fínt tiltak við nógvum góðum minnum.

Ísak

# Lýsing

Sambært viðtøkum felagsins verður hervið lýst til aðalfund í Bygdahúsinum í Skopun, leygardagin 24. mars 2001 kl. 16. Mál, ið skulu viðgerðast á aðalfundinum, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar áðrenn fundin.

Áhugafelag fyri Føroyskar Harmonikusælarar

**ÁFH**

# VIÐTØKURNAR HJÁ ÁFH

§ 1 Navn.
Navn felagsins er: Áhugafelag fyri Føroyskar Harmonikuspælarar. Stytt ÁFH

§ 2 Endamál.
Endamál felagsins er at stuðla og menna harmonikusplæli og áhugan fyri harmonikutónleiki í føroyum.

§ 3 Limaskapur.
Limur í felagnum kann ein og hvør gerðast ið vil stuðla endamáli felagsins og ganga undir lógir og reglur felagsins. Limur í felagnum er ein og hvør ið hevur goldið limagjald.

§ 4 Skipan felagsins.
Aðalfundurin verður hildin á hvørjum ári. Aðalfundurin er hægsti mynduleiki felagsins. Dagsskráðin á aðalfundi er:

1. Val av orðstýrara eftir uppskoti frá nevndini.
2. Val av fundarskrivara eftir uppskoti frá nevndini.
3. Formansfrágreiðing um virksemi felagsins í farna ári.
4. Framløga av grannskoðaðum rokskapi til góðkenningar.
5. Ásetan av limagjaldi.
6. Innkomin mál.
7. Val av tveimum nevndarlimun.
8. Val av grannskoðara, ið situr til næsta ársaðalfund.
9. Ymiskt.

Boðað skal verða til aðalfundar í minsta lagi 1 mánað áðrenn ásettan dag. Fundurin hevur avgerðarrætt uttan mun til tal av uppmøttum limum. Vanligur meirluti er galdandi, tó krevst 2/3 av uppmøttum limun í meirluta um lógarbroyting skal fremjast. Uppskot sum ikki eru nevndini í hendi seinast 14 dagar áðrenn aðalfundin, kunnu ikki koma til avgreiðslu. Tó er uppstilling av valevnum undantikin. Valevnir og nevndarlimir skulu vera 18 ár ella eldri og limir í felagnum.

Nevndin er samansett av einum formanni, kassameistara og skrivara. Tveir nevndarlimir standa fyri vali á hvørjum ári. Atkvøðugreiðslan við vali av nevndarlimun er skriftlig. Nevndin skipar seg sjálv. Kassameistarin skal føra roknskap yvir virki felagsins. Skrivarin skal føra gerðabók yvir virki felagsins. Gerðabókin skal liggja frammi til skoðan á aðalfundi.

Nevndin hevur dagligu leiðsluna av felagnum um hendi og hevur avgerðarrætt í øllum spurningum, sum ikki nýtast at koma fyri á aðalfundi. Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu og er vanligur meirluti galdandi. Til keyp og sølu av fastari ogn og skuldarbinding av felagnum upp á virði yvir 10.000 krónur, krevst aðalfundargóðkenning.
Eykaðalfundur kann vera hildin um meirlutin í nevndini ella 1/3 av limunum krevja hetta. Fráboðað skal verða til eykaaðalfund 14 dagar áðrenn ásettan dag.

§ 5 Avtøka av felagnum.
Felagið kann bert avtakast á einum aðalfundi við í minsta lagi 2/3 í meiriluta av uppmøttum limum. Um felagið verður avtikið fella ognir tess til Føroya Musikkskúla.

Viðtikið á stovnandi aðalfundi 2. November 1996 í Nólsoy.

---

**Aðalfundarfrásøgn**
Aðalfundur ÁFH´s flagdagin , 25.04.2000 kl. 16:30 í Skansastovu. Møttir limir: 11. Skrá: Smbr. lógini. Formaðurin setti fundin nakað seinni enn ætlað - flestu limir møttu ikki fyrr enn eftir flagdagshaldið - og skeyt upp at velja Ísak til orðstýrara. Hetta var einmælt samtykt. Fyrst á skránni var formannsfrágreiðingin. Nomið varð við hendingar í farna ári. Formaðurin hugleiddi um tíðina áðrenn felagið var stovnað. Næm við ymisk tiltøk upp gjøgnum tíðina. Nevndi harmonikutúranar við Norrønu og teir fundir, sum høvdu verði; serliga var tað fundurin á Aberdeen-túrinum, sum endaði við at ein bólkur var settur fyrireiðka stovnan av felagnum. Síðani stovnanina hevur sama manning siti í nevndini, og formaðurin endaði við at boða frá at hann og skrivarin, Hilmar Joensen ynsktu at fara úr nevndini.
Síðani var framløga av góðkendum roknskapi á skránni. Kassameistarin gjøgnumgekk roknskapin, sum var góðkendur av grannskoðara felagsins. Roknskapurin var góðkendur av aðalfundinum uttan viðmerking.
Eftir hetta var limagjaldið til viðgerðar. Tað var einmælt samtykt at limagjaldið skuldi ikki broytast.
Innkomin mál, var næsta punktið á skránni. Eitt mál var innkomið til viðgerðar. Hetta var eitt bræv, sum var undirskrivað av rættuliga nógvum limum. Pauli Jacobsen greiddi nærri frá innihaldinum, sum snúði seg um trupuleikan at gera tiltøk í navni felagsins. Í brævinum



Nevndin: Juel, Ísak og Finn á nevndarfundi 8. august 2000

# STUBBAR

**Nevndin skipa seg**
Nevndin hevur skipa seg. Ísak N. Jacobsen er formaður, Juel Høgnesen er skrivari og Finn Hansen er kassameistari.

**Búðmerkjakappingin**
Nevndin avgjørdi stutt áðrenn aðalfundin á Oyrabakka í 1999, at bjóða limunum til eina búðmerkjakapping. Einans eitt uppskot kom inn, so aðalfundurin avgjørdi at útseta avgerðina til fleiri eru komin inn. Ætlanin var ikki at hetta skuldi gerðast eitt afturvendandi tiltak. Lat meg endurtaka, at vit høvdu hugsa okkum eitt búðmerki, ið lýsir virksemið og endamálið hjá felagnum. Búðmerkið kann vera í litum, men skal eisini kunna brúkast svart og hvítt. Limirnir kunnu síðani atkvøða um, hvat av uppskotunum skal verða búðmerkið hjá ÁFH.

**Skriva**
Valsignaði skrivi okkum nakrar reglur um eitthvørt av áhuga. Tað veri seg ferðafrásagnir, frásagnir frá tiltøkum ella okkurt evni tú hevur hug at skriva um.

**Postsmogan broytt**
Felagið hevur fingið nýtt postsmogu nr: Postsmoga 3001 - FO 110 Tórshavn.

**Giro**
Felagið hevur enn sum áður: Giro nr. 78093.

**Limagjald**
Nevndin avgjørdi á seinasta nevndarfundi at innkrevjingin av limagjaldinum skal latast upp í hendurnar á Postverk Føroya. Hettar kostar eitt ávíst gjald fyri hvønn limin, men lættir munandi arbeiðið hjá nevndini.

**T-bræv**
Vit hava fingið eina fyribils teldupostbústað (e-mail adr.):
**accordion_fo@hotmail.com**

Ísak

---

bleiv skotið upp at broyta navnið á felagnum. Kjarnan í brævinum er spurningurin um hvussu felagið kann savna pening til ymisk tiltøk.
Regin nevndi møguleikan at sláa seg saman við øðrum feløgum og avtala at deila yvirskotið!
Pauli meinti at aðrir møguleikar máttu vera enn spæl, fyri at fáa pening!
Tað er aktuelt at savna inn pening til ein Íslandstúr, og Óli Johannesen vildi vita hvar peningurin til hendan túrin skuldi fara.
Ísak meinti at navnabroyting ikki fór at bøta um støðuna, men vísti hinvegin á møguleikan fyri at gera eitt stuðulsfelag. Tað bleiv síðani tosa nógv um munin á einum áhugafelagi og einum stuðlafelagi, tó uttan nakra ávísa niðurstøðu.
Sum svar til Óla var m.a. víst á møguleikan fyri at einkultpersónar stovna eina konto, sum pengarnir vera settir inn á. Eyðfinn nevndi dóttrina, sum hevði staði til svars fyri Fimleikafelagið.
Óli ger vart við at tað er felagið, sum er boði og nevnir at m.a. Fuglafjarðar Hornorkestu hevur haft køkutombula og fingið stuðul til at gera túr fyri. Tá túrurin var av var avlop, sum brúkt til ljóðføri. Kommunan var tann einasti, sum hevur biði um roknskap. Hann skilti ikki at ÁFH skuldi vera ørvísi stilla í slíkum málum. Ísak viðmerkti at Toll & Skatt setti ávísar treytir, sum skuldu uppfyllast.
Niðurstøðan í hesum málinum var at hvørt tiltak skuldi skipast sum eitt projekt. Teir sum skipa fyri mugu samlað tann neyðuga peningin og gera avsluttaðan roknskap tá projekti er liðugt. Á henda hátt er ikki talan um at brúka pening frá felagnum, og sostatt er ikki eyðugt at standa til svars yvirfyri møguligum limun, sum ikki eru við á t.d. eini ferð. Luttakarnir á túrinum skaffa sjálvir pengarnar við hjálp av tiltøkum og stuðli og um nakað avlop verður, avgera somu luttakara hvar tað skal fara.
Juel og Óli greiddu annars frá teirra leikluti í samband við fyrireikingarnar av Íslandstúrinum. Pauli og Hentzar eru samskiparar av túrinum og hava fingið teir upplýsingar, sum fyribils eru til taks m.a. frá Juel og Óla.
Pauli fekk váttan frá fundinum um at fyrireiðkarnir kundu gera tey tiltøk teir finna neyðug fyri at fíggja túrin, treyta av at neyðug loyvi fyri tiltøkunum vóru fingin til vega. Avsluttandi roknskapur skal gerðast fyri túrin.
Næst á skránni var val av nevndarlimum. Fimmboði og Hilmar ynsktu ikki at halda fram í nevndini. Í teirra stað vóru Juel Høgnesen, Leirvík og Finn Hansen, Tórshavn einmælt valdir. Triðji nevndarlimurin er Ísak, sum ikki stóð fyri vali hesu



framhald á síðu 8

# ÍSLANDSFERÐIN 2000


Bjørn Ólafur Hallgrímsson og Jón Berg Halldórsson við frúðum



Líka síðani Harmonikufelagið í Reykjavík var her á vitjan og fram til fráfaringardagin, hava vit fyrireika okkum til Íslandstúrin. Limirnir hava á mangan hátt verði við til at savna pening inn. Nevndin í ÁFH fekk á seinasta aðalfundi heimmild til at seta ein projektbólk til at samskipa tiltøkini og standa fyri innsavnanini av peningi. Sum nevnt í leiðarinum, so kundi samstarvið við Bátaeigarafelagið í Havn verði betri, men sum heild má sigast at bólkurin og limirnir hava verði raskir.
Undan túrinum høvdu vit leiga stóran buss við førara frá Ásmundi og vóru vit heppin at fáa Brand sum førara. Túrurin við Norrønu gekk av tí besta og veðrið var gott, men vit blivu eitt sindur sinkað av tí at annar motorurin fekk brek. Um middagsleitið vóru vit á Seydisfirði. Fyri okkum stóð maður sum eg ikki hevði sæð fyrr, men hoyrt um. Tað kom at broytast. Maðurin var Egil Jónsson. Hann hevði ókeypis boði sær at verða frásøgumaður á túrinum. Jónsvein Poulsen og Óli Johneses úr fuglafirði kendu Egill frá eini Føroyaferð hjá Norðfiringum. Ætlanin var eisini at enda Íslandstúrin við at vitja Neskaupstað og har skuldi Egill verða vertur.
Komin í land í Seydisfirði gekk leiðin til Egilstaðir har stuttur støðgur var. Stuttir stegðir vóru okkurt um hvønn tíma, allan vegin til Reykjavíkar. Egill greiddi frá. At birja við á nordlenskum málið, men vit bóðu hann bara tosa íslendskt og tað gekk bara uppá stás.
At fara at greiða frá øllum tí vit sóðu, eri eg ikki førur fyri, tí Ísland er so stórsligið og tann myndin eg hevði av landinum er heilt broytt. Ísland er eitt, uppá allar mátar, stórt og stórsligið land í mun til Føroyar.
Tá ið vit seint á kvølidð nærkaður Reykjavík og komu til Hellu, stóðu ein bólkur av garvillum berserkum og foraði okkum vegin. Bussurin steðgaið og inn trinu hesir óðu menn. Øll vóru rikin úr bussinum og inn í eini hús beint við. Tað vísti seg skjótt, at hesir ikki vóru so vandamiklir, sum fyrst sýntis. Nei! hetta vóru harmonikulimir í Harmonikufelag Rangæinga, ið á henda sjálsama hátt bjóðaði okkum vælkomnum. Inni var okkum boði eitt hvørt at leska okkum við saman við góðun harmonikutónleiki. Støggurin var stuttur, men sera hunaligur og vit takkaðu fyri og síðani gekk leiðin til Hafnafjørð, beint við Reykjavík, har vit skuldu búgva í Arahus tað vikuskiftið. Vit komu til gistingarhúsin og funnu okkara kamar og song.
Tað var sovið leingi morgunin eftir, tí fólk vóru troytt av tí

Framhald á síðu 9

# HARMONIKUFELAG REYKJAVÍKUR


Konsert við HR í Leirvík undir leiðslu av Karl Jónatansson

Eyðfinn og Juel greiða soleiðis frá:
Fríggjadagin 21. mai 1999 kl. 6 um morgunin legði M/S Norrøna at bryggju í Tórshavn. Við umborð var ferðalag av harmoniku-leikarum úr Harmonikufelag Reykjavíkur.
Juel og Eyðfinn vóru á bryggjuni og tóku ímóti gestunum, og vístu teimum síðani á leiðina til Bládýpi.
Síðani varð farið niðan í Útvarpið har vit fingu kaffi og luttóku í morgunsendigini millum 8 og 9. Íslendingarnir spældu 2 løg, og síðani greiddi Jón Berg Halldórsson, formaður í Harmmonikufelag Reykjavíkur, eitt sindur frá um hvussu túrurin varð komin í lag og hvørjar ætlaninar við Føroya-túrinum vóru.
Seinri sama kvøldi bjóðaðu Íslendingarnir okkum oman í Bládýpi. Har fingu vit smakka íslendskan mat og okkurt leskandi var eisini afturvið. Harmonikurnar blivu tiknar fram, og var skemta og spælt út á miðu nátt.
Dagin eftir var avtalað at møtast kl. 14 uppi í SMS. Gestirnir skuldu spæla á Torginum í SMS í ein góðan tíma. Fitt av fólki var og lurtaði og vóru teir, væl fagnaðir.

# NÝGGJ FLØGA



Sjúrður Strøm

Tann fyrra fløgan vit hava tikið við í hesa útgávuna er fløgan við harmonikutónleiki spældur av Sjúrða Strøm. Tað er TUTL ið stendur fyri útgávuni av fløguni. Kartni Fornagarð hevur klipt og redigerað og Pauli Jacobsen er produsentur. Á fløguni eru ikki minni enn 59,33 minuttir av góðum harmonikutónleiki. Trí løg, sum




Sjúrður hevur gjørt umframt 22 onnur kend og minni kend løg. Upprunin til hesa fløgu er tað bandatilfar, sum Sjúrður Strøm sáli legði eftir seg. Fløgan fæst, umframt frá TUTL, í flestu musikforrætningum kring landið, og kann eisini keypast um alnótina á heimasíðuni hjá TUTL. Sum skilst á Paula, so er tilfar til einar tvær fløgur afturat. Nær hesar verða útgivnar er ikki greitt enn, men vit bíða spent.

Hin fløgan er útgivin av Jónatan Karlsson, sonur navnframa Íslandska harmonikuspælaran Karl Jónatansson. Fløgan er útgivin í samband við "The International Reykjavík Accordion Festival 2000". Á fløguni er tónleikur spældur av øllum teimum luttakandi bólkunum og einstaklingum á festivalinum. Umframt fleiri heimskend nøvn eru Føroyar eisini umboðaðar á fløguni við tveimum bólkum. Berg &




Jacobsen við tveimum løgum og konsertbólkurin hjá ÁFH undir leiðslu av Óla Johannesen við tveimum løgum. ÁFH hevur útvega sær nakrar fløgur og kunnu limir í ÁFH ogna sær hana við at venda sær til Paula, ið stendur fyri søluni vegna ÁFH.

Ísak

---

Um fýra tíðina vóru øll ferðaklár aftur og nú gekk leiðin til Leirvíkar. Við í bussinum hjá íslendingunum vóru Eyðfinn, Hannis, Erlant og Martin. Í Leirvík tóku Juel og Óli ímóti og bjóðaðu øllum vælkomin. Har stóð væld ekka borð við føroyskum mati og høskiligum løgi. Tað vóru kona og dóttir Juel og skilfólk, ið høvdu staðið fyri og tøkk fáði tey fyri tað. Aftaná borðhaldið var fari í fimleikahøllina í skúlanum har konsert skuldi verða kl. 20:30. Juel bjóðaði áskoðarunum vælkomin og síðani helt bygdaráðsformaðurin eina røðu. Hann tosaði eitt sindur um sambandið millum føringar og íslendingar og um fiskaríðið undir íslandi fyrr í tíðini.

Høllin var full av fólki og so fóru íslendingarnir í holt við framførsluna. Har var bæði duo - trio - og fult orkestur undir leiðslu av Karl Jónatansson. Hetta eydnaðist sera væl.

Aftaná takkaði Hans úr Fuglafirði, at føroyingar og íslendingar møttust soleiðis at fólk fekk hugna sær við góðum harmonikutónleiki.

Fólkið varð boðið at koma til dans seinni um kvøldið. Gestirnir framførdu góðan dansi-tónleik og Juel, Óli, Flóvin og Eyðfinn hjálptu til. Eisini var farið upp á gólv fyri at vísa gestunum føroyskan dans. Klokkan var farin um 1. tíma áðrenn "ballið var buði".

Dagin eftir fór ferðalagið busstúr. Juel og Eyðfinn vóru við. Koyrt var norður til Hotel Eiði har kaffi og køkur stóðu fyri gestunum. Harmonikan var sjálvandi tikin fram. Síðani gekk leiðin til Gjáar. Í gjønni varð harmonikan eisini roynd. So var spákað í bygdini og hugt at gomlun húsum og hjøllum. Á heimferðini bleiv leiðin løgd um Oyggjarvegin og so suður til Havnar.

2. Hvítusunnudag var aftur ball. Nú var tað Eydnan á Oyrabakka sum stóð fyri. Har var borðreitt við feskari suppu, oksakjøti við ísdesert og kaffi omaná. Undir borðhaldinum varð sungið úr sanghefti hjá Eydnuni. Um kvøldi var enskur dansur og um 22 tíðina varð farið uppá gólv. Hetta var ynski frá íslendskum pensionistafelagið ið komið var til dansin. Dansa varð til okkurt um 3 tíðina.

Mikudagin 26. mai fór ferðalagið aftur til Íslands og hava vit frætt at tey vóru sera væl nøgd við túrin.

Ísak

ferð.
Síðani var val av grannskoðara á skránni. Eyðfinn Guðjónsson, sum hevur verði grannskoðari síðani felagið varð sett á stovn, bar seg undan afturvali orsaka av at hann er skrásettur grannskoðari. Skoti var upp at Hentzar Hammer kom í hansara stað og hetta var einmælt samtykt.

Síðst á skránni var ymiskt. Birte heitti á limirnar, sum luttaka á stevnum o.l. um at koma til felagið við frágreiðing, so aðrir limir eisini kunnu hoyra um tiltøk, sum teir ikki hava havt møguleika at luttaka í.

Ísak helt tað vera eitt gott hugskot um felagið hevði eina heimasíðu. Hann vísti á nakrar møguleikar: Felagið kundi presenterast úteftir á heimasíðuni, lýsingar, nótabanka o.l. Hann greiddi frá at kostnaðrin fyri at upprætta heimasíðuna var kr. 1.900,- og síðani var eitt fast gjald uppá kr. 1.400,- sum skuldi gjaldast árliga. Fundurin tók væl undir við hugskotinum.

Juel visti at siga at Elis Poulsen kundi hugsa sær at felagið hevði stevnu á Sandi og tað var avrátt at Juel skuldi tosa nærri við Elis um hetta.

Í sambandi við búmerki til felagið kundi Ísak upplýsa at higartil var bert eitt uppskot komið inn. Pauli kundi hugsa sær at búmerkið var klárt til Íslandstúrin, men samanumtikið var fundurin samdur um at betri var at geva málinum góða tíð.

Tosa var eisini um tað stóra felagsorkestrið. Eyðfinn eftirlýsti einari betri skipan fyri orkestrið, men Óli eftirlýsti einum størri innsatsi frá limunum, m.a. heimaarbeiði og uppmøting til samanspæl. Juel kom við einari áheitan til limirnar um at tey, sum ikki vóru sikkur í spælinum, ikki spældu við í tí tey ikki duga. Hann ásannaði at spælið var blivi nógv betri síðani byrjað var við samanspælinum, og kundi sostatt staðfesta at arbeiðið ikki hevði verði til fánýtis.

At enda heitti Pauli á felagið um at gera eitthvørt við skattaspurningin. Hann meinti at felagið áti at fingið mynduleikarnar at ásanna at vit gera eitt sosialt arbeiði ókeypis.

Fundur lokin kl. 18:30
Fimmboði Lisberg,
fundarskrivari

---

**Limalistin**

Ísak N. Jacobsen
Smærugøta 16 a - 100 Tórshavn
Pauli Jacobsen
Hetlandsvegur 10 - 100 Tórshavn
Fimmboði Lisberg
Mækjugøta 18 - 100 Tórshavn
Hilmar Joensen
270 Nólsoy
Jákup Mikkelsen
Stoksoyravegur 13 - 700 Klaksvík
Hans A. Poulsen
Bøgøta 15 - 700 Klaksvík
Flóvin Jacobsen
176 Velbastaður
Tór Hendriksen
210 Sandur
Óli Jacobsen
Jørundagøta 37 - 188 Hoyvík
Johannis Simonsen
Blákollugøta 5 - 100 Tórshavn
Finn Hansen
Varagøta 7 - 100 Tórshavn
Rene Hansen
270 Nólsoy
Óli Johannesen
530 Fuglafjørður
Ólavur Magnussen
Hvannkrókur 4 -100 Tórshavn
Erling Berg
Handaratún 5 - 100 Tórshavn
Heri Ellingsgaard
Oman Eið 10 - 700 Klaksvík
Róðin Thomsen
650 Toftir
Aðalstein Magnusson
Grótbrekka 5 - 700 Klaksvík
Martin Heldarskarð
Víkarvegur 34 - 700 Klaksvík
Tummas Heri Thomassen
380 Sørvágur
Eyðfinnur Guðjonson
Tórgarðsgøta 13 - 100 Tórshavn
Erland Jacobsen
Klaksvíksvegur - 700 Klaksvík
Eiler Rasmussen
Rættargøta 12 - 700 Klaksvík
Høgni Mikkelsen
niðan Horn 28 - 700 Klaksvík
Kristian Meitil
Heiðavegur 17 - 100 Tórshavn
Charles Gade
270 Nólsoy
Juul J. Høgnesen
520 Leirvík
Hóraldur Joensen
Nýggjagerði - 512 Norðagøtu
Ivan Holm
270 Nólsoy
Regin Jacobsen
Tórgarsgøta 11 - 100 Tórshavn
Hentzar Hammer
800 Tvøroyri
Oddgeir Jensson
826 Trongisvágur
Flemming Jespersen
800 Tvøroyri
Erlant Jacobsen
800 Tvøroyri
Birgar Niclasen
800 Tvøroyri
Jákup Alberg Eliassen
520 Leirvík
Jónsvein Eliassen
520 Leirvík
Súni Eliassen
520 Leirvík
Tommy Olsen
Spógvavegur 15 - 100 Tórshavn
Regin Havn Rasmussen
335 Leynar
Birte Havn Rasmussen
335 Leynar
Árni Brekku
Akranesgøta 6 - 100 Tórshavn
Suni Hammer
Vípuvegur 21 - 100 Tórshavn
Knút Olsen
Tórugøta 9 - 100 Tórshavn
Hjalti Skaalum
Áargeil 7 - 100 Tórshavn
Sólbjørg Fríheim
Hetlandsvegur 10 - 100 Tórshavn
Hans Jørgen Johannesen
Lávíkarbrekka - 700 Klaksvík
Ivan Johannesen
Láarvegur 7 - 100 Tórshavn
Ólavur Joensen
665 Skipanes
Per Samuelsen
530 Fuglafjørður
Jónsvein Poulsen
530 Fuglafjørður
Poul Hammer
900 Vágur
Árni Olsen
850 Hvalba
Poul Jákup Thomsen
Suðuroyarvegur 16 - 100 Tórshavn

54 limir íalt.




langa túrinum dagin fyri. Seinrapartin var farið ein túr í Klingruna. Um kvøldið vóru vit boðin í veitslu sum Harmonikufeleag Reykjavíkur skipaði fyri. Vit komu til væl borðeitt borð við alskins góðum mati. Eg minnist serliga tí sera góðu svartfuglasuppuna, sum eg ikki havi smakk fyrr. Har var práta og sungi og Jón Berg Halldórsson helt eina vælkomstrøðu og eg takkaði vegna ÁFH og handaði HR eina lítla gávu frá felagnum. Seinri um kvøldi komu fólk frá føroyingafelagnum í Reykjavík at vitja og fóru vit uppá gólv. Tá ið klokkan var okkurt um ellivu vóru dyrnar lætnar upp og so var almennur dansur. Vit og HR skiftust um at spæla. Ein óføra góð veitsla har fleiri fingu høvið at tosa við føroyingar búsitandi í Íslandi.

Morgunin eftir fóru vit ein busstúr runt í Reykjavík og um døguratíð fóru vit inn á ellisheimið Hrafnistu at spæla fyri teimum eldru. Afturfyri fingu vit ein góðan lippu døgura. Mett og væl fyri fóru vit við bussinum til Bláa lón at svimja. Tað var einstandandi og nakað heilt fyri seg. Aftaná fóru vit at hyggja eftir kraftverkinum, ið er atvoldin til Bláa lón.

Tá vit so umsíður komu aftir til Arahus máttu vit skunda okkum, tí um kvøldið skuldu vit upptrakka á festivalinum á Hotel Ísland, ella á Broadway sum tað eisini verður kalla. Vit vóru 12 harmonikuspælarar umframt 2 guittaristar og ein bassistur. Berg & Jacobsen luttóku eisini. Tað var stuttligt at sleppa at spæla í eini so fínari høll, men ljóðteknikkurin var ikki nakað at skriva heim um.

Sunnumorgunin vóru vit aftur uppá fartin. Tað vóru teir báðir Bjørn Olafur Hallgrímsson og Kristin Valdimarsson ið bjóðau seg framm sum guide til Tingvellir, Geysir og eitt




kraftverk. Tað vóru vit sera takksamir fyri.

Um kvøldið var aftur ball, men nú var tað meira óformelt. HR høvdu borðreitt við alskins Ísledskum specialitetum. Tað var stuttligt at smakka. Har var sungið og spælt, men vit góðust í rímuligari tíð, tí vertirnir skuldu til arbeiðis dagin eftir og vit skuldu tann langa veg um norðurlandit til Neskaupstað.

Túrurin var langur, men vit støggaðu á við jøvnum millumbili at strekkja beinini o.s. fv. Egill greiddi frá øllum tí ið var at síggja.

Á Akureyri var støgurin eitt sindur longrið. Harmonikan varð tikin fram og nøkur løg vóru spæld í miðbýnum. Eisini eydnaðist okkum at heilsaðu uppá komandi og farandi forman í harmonikufelagnum F.H.U.E.

16 tímar eftir fráferðina í Reykjavík steðgaði bussurin við skúlan í Neskaupstaði. Her skuldu vit gista tær komandi tríggjar næturnar. Har stóð Lauga kona Egill so frintlig og tók ímóti okkum. Vit vóru troytt, so tað var skjótt at alt fylgið lá í fasta svøvni.

Tá ið vit einaferð vaknaðu, var durdar vegur og termometri togaði upp móti teimum 20 stigunum. Úti-svimjuhylur er í býnum og fleiri av okkum fóru at svimja. Her í Neskaupstaði skuldu vit slappa av og tað gjørdu vit sannuliga eisini í tí fína veðrinum. Jú! tann Íslendska náttúran vísti ræ ttuliga sína góðu síðu og vertirnir tóku sær væl av okkum. Tann fyrra dagin vóru vit og spældu fyri teimum gomlu á ellisheiminum og hugnaðu okkum saman við teimum. Eisini vóru vit vístir runt á sjúkrahúsinum, sum er beint við.

Tann seinra dagin vóru vit og spældu í miðbýnum, hugdu eftir veitsluhøllini á hotellinum og vitjaðu tí sera hunaligu kirkjuna sum prestur vísti okkum runt í. Um kvøldi var veitsla í venjingarhølunum hjá harmonikufelagnum. Borðreitt var við góðum gríturætti og omaná fingu vit køkur og kaffi. Har var sera hunaligt og práta og spælt var bæði væl og leingið.

Snimma morgunin eftir fóru vit úr Neskaupstaði til Seydisfjarðar, har Norrøna bíðaði eftir okkum. Egill, sum hevði verði okkara trúgvi frásøgumaður á allari ferðini, stóð á keiðini og veitraði okkum farvæl.

Ein dreymaferð var komin at enda og eg má siga at eg ongantíð havi følt meg betri móttiknan og borðin so á lógvunum, sum á hesi ógloymandi Íslandsferð.

Ísak

# HARMONIKUVINIR

Í bygd og bý til dans vit spæla,
til gamlar dansir lið um lið,
onkur vildi okkum mæla,
haldi fast við henda sið.
Ja, her er rómur her er kæti,
tá vit spæla upp til dans.
Hygg nú við frú har dansar Pætur,
Apolonia og Petur Hans.

Kom drag í bjølgin garpar kátir,
nú tónar ljóma hátt í kvøld,
hoyrist geipan reyp og látur,
í tí stóru mannafjøld.
Nú øll til gamlar dansir svinga,
Schottis, polka, tango, vals.
Á miðum gólvi dansar Inga
og Jógvan Sofus í ein krans.

Ja, fyrr var Tummas fiskikongur,
mong ár við slupp sum yngri var,
søkklaðin kom hann at strondum,
teir royndu víða hvar.
Hann nú við frú so spelkin dansar,
mangar gamlar vinir sær.
Við unga sprund nú Óli gramlar,
kom nú og dansa ein dans við mær.

Á festivalum og á stevnum,
vit spældu saman mangt eitt lag,
royndu vit við fingrum hegnum,
sóðu fólk í vóru glað.
Nú spælir liði sísta dansin,
gentir dreingir dansi nú,
ikki smæðast tak bert kjansin,
so lætt tað er hvør skuldi trú

---

# KAPPING



Hvør er hesin jassurin ?



### SPURNARKAPPINGIN

Henda spurnarkappingin er í tveimum. Ein vinningur verður drigin millum tey ið svara rætt upp á teir fimm spurningarnar, og ein vinningur verður drigin millum tey ið finna tey ið finna teir fimm feilirnar í myndini høgrumegin.

Vinningurin í báðum førðum er ein fløga av sviðanum Lars Karlsson. Vinningarnir eru lætnir av felagnum Tutl.

Loysnirnar skulu sendast í einum brævbjálva merktur "Spurnarkappingin" til: ÁFH - Postsmoga 3001 - 110 Tórshavn.

Loysnirnar skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 15. mars 2001. Vinnararnir verða drignir á aðalfundinum 24. mars 2001.

### SPURNINGARNIR

1. Hvør er maðurin í myndini?
2. *"Uppilagstur sum sjómaður er pensionist, men hann ber seg tó væl, tað er púra vist."*
   Hvat eitur sangurin?
   Hvør hevur gjørt lagið?
   Hvør hevur gjørt orðini?
3. Nær var tann fyrsti harmonikutúrurin við Norrønu? dag og ár.
4. Hvør hevur gjørt **Visen om de atten svaner**?
5. Hvør hevur gjørt lagið ***Kara på tur***?

valsur

# HARMONIKUVINIR

ORÐ OG LAG
REGIN JACOBSEN



# Tónasmiðurin hesa ferð



Navn: Regin Jacobsen
Føddur: 6. oktober 1939
Bústaður: Tórshavn

Regin Jacobsen er ein sera væl kendur og umtóktur harmonikuspælari her í Føroyum. Umframt at vera ein garvaður veteranur á pallinum, er hann ein sera góður tónasmiður. Hansara dagliga starv er bakari umborð á Norrønu, so umframt mjøl og deiggj, er harmonikan dagliga á hansara hondum. Regin segði fyri mær, at pápi hansara eggjaði honum til at spæla harmoniku, so hann byrjaði sum 13 ára gamal. Eitt tíðarskeið gekk hann til orgulspæl hjá Tinu Mortensen. Seinni hevur hann lært seg at spæla uppá saxofon og klarinet, men harmonkan er hansara høvuðsinstrument.

Tá ið man sigur ”Regin”, so hugsar man beinanvegin um ”Gágguna”, ”Flamingo”, ”Rúnar” o.s.fr. Hesir bólkar áttu lívið í tí enska dansinum tann tíð tað var.

Regin, sum kanska er tann virknasti av øllum harmonikuspælarum í landinum, hevur longu roynt at bróta upp úr nýggjum m.a. tá hann gjørdi Vætradansin, sum Rhoda Rubeksen gjørdi stev til. Somuleiðis gjørdi Regin Jubilæumsdansin hjá Dansifrøði, sum Mia Cameron hevur gjørt stev til.

Regin er fryntligur og lítilátin maður. Hann gjørt hópin av løgum, fleiri við orðum, men nógv tað mesta er ókent millum mannað, tað er stórt spell. Eg vóni at hann skjótt fær upp í lag at útgeva nakað av tí hann hevur liggjandi, tí góðskan er góð, tað er lagið ”Harmoniku-vinir” gott prógv um.






At Regin, og tað hann umboðar, er ein tíðandi partur av føroyskari tónlistamentan, hava æðrir enn vit ásannað og man tað eisini verða tí, at hann er við á tí eina frímerkinum.

Ísak




